Alheimsupphiting – ella óvanliga heit ár:

# Hitin á landgrunninum ongantíð

**Síðan 1991 hevur Fiskirannsóknarstovan mátað hitan á sjónum við Oyrargjógv og ongantíð áður, síðan hesin mátingar byrjaðu, hevur miðalhitin verið so høgur síðan á sumri 2003. Hinvegin var summarið 2004 tað næst heitasta. Eisini var veturin 2002-2003 tann heitasti hetta tíðarskeiðið. Á Fiskirannsóknarstovuni duga tey tó enn ikki at siga, um økti hitin í sjónum er ein avleiðing av alheims upphitingini, tí aðrar kanningar vísa, at sjógvurin eisini var óvanliga heitur árini 1959, 1960 og 1961**

SJÓVARHITI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskirannsóknarstovan sigur, at sjógvurin, sum er innast á landgrunninum, lutvíst er avbyrgdur frá sjónum uttanfyri.

- Hetta hevur við sær, at hesin sjógvur ikki líkist sjónum uttanfyri. Eitt nú er hitin á landgrunninum næstan altíð lægri enn hitin uttanfyri. Sjógvurin innast á landgrunninum, innanfyri 100-150 metrar, er umleið eitt stig kaldari enn sjógvurin úti á. Tað er eitt sonevnt hitamót, sum skilir sjógvin inni á frá tí ytra sjónum, og í hesi greinini er tað sjógvurin, sum er innanfyri hetta hitamót, sum verður umrøddur.

Hesin sjógvur er væl blandaður, tí hitin er næstan tann sami allastaðni innan fyri mótið á landgrunninum, serliga í norðraru helvtini. Úti á er sjógvurin heitari vestanfyri landgrunnin enn eystanfyri.

Karin Margretha Larsen, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni, vísir á, at umframt henda munin millum sjógvin úti á og inni á, er eisini munur á, hvussu hitin broytist við dýpi.

## Árstíðarbroyting

- Á landgrunninum er nógvur røringur í sjónum, og hann er tí sera væl blandaður. Tað hevur við sær, at hitin er hin sami úr vatnskorpu og niður á botn.

Orsøkin til hetta, sigur hon, er harða sjóvarfallið inni á grunnum, sum alla tíðina blandar sjógvin. Hinvegin er sjóvarfallið ikki so hart úti á, og tí kann sjógvurin har verða lagskipaður við heitum sjógvi í erva og køldum í neðra.

- Hitin í sjónum hevur eina regluliga árstíðarbroyting, har sjógvurin er kaldastur í februar ella mars og heitastur í august ella september. Munurin millum summar og vetur liggur um eini 4 stig, sigur hon.

Lagt verður aftrat, at árstíðarbroytingar í sjógvi og luft vera stýrdar av, hvussu nógv sólin skínur, og hvussu høgt sólin stendur á himli.

- Men hitin í luftini ávirkast nógv skjótari av sólini, og luftin ger sítt til at hita ella køla sjógvin. Mátingarnar vísa, at hitabroytingin í luftini millum summar og vetur er størri enn í sjónum, nevniliga umleið 8 stig. Sjógvmátingarnar eru gjørdar við Oyrargjógv og luftmátingarnar í Havn. Um veturin er hitin í luftini minni enn í sjónum, men um summarið er hitin í luftini hægri. Hetta merkir, at longu tíðliga um summarið, tá ið luftin er vorðin heitari enn sjógvurin á landgrunninum, verður hiti fluttur úr luftini í sjógvin.



## Ikki avbyrgdur heilt

Karin Margretha vísir á, at í august, tá ið summarið fer at halla, byrjar luftin at kólna aftur – og tá ið so luft og sjógvur eru líka heit, hitnar sjógvur ikki meira, men fer aftur at kólna.

- Av tí, at luftin kólnar skjótari enn sjógvurin, verður sjógvurin um veturin kóldur av luftini, leggur hon aftrat.

Luftin kølir tó ikki bara sjógvin inni á, men eisini úti á, og her er rættiliga stórur munur.

- Inni á er sum kunnugt rættiliga grunt, og tí er lutfalsliga nógv minni av sjógvi inni á enn úti á. Tá ið røringur kemur í sjógvin úti á um veturin, eitt nú av vindi, blandast hesin sjógvur heilt niður á 400-500 metra dýpi, so tað er sjálvsagt, at her er meira sjógvur, ið skal kølast. Tí megnar luftin at køla sjógvin inni á meira enn sjógvin úti á.

Aðrastaðni í greinini er nevnt, at hitamunurin á sjónum inni á landgrunninum á sumri og vetri er umleið 4 stig, men úti á er munurin bert eini 2 stig. Úti á er hetta tó bert galdandi, um miðalhitin verður roknaður úr vatnskorpuni og niður á umleið 100 metra dýpi.

- Hóast eitt hitamót er millum sjógvin inni á og sjógvin úti á, er sjógvurin inni á ikki heilt avbyrgdur. Sjógvurin blandast sjálvsagt nakað, og tá ið lutfalsliga lítið av sjógvi er inni á, kann sjógvurin uttanífrá gera mun og ávirka hitan í sjónum á landgrunninum, sigur hon.

## Hitin setir met

Nú sjóvarhitin á landgrunninum hevur sett met, er tað kanska freistandi at halda, at nógv umrødda alheimsupphitingin eisini er farin at ávirka viðurskiftini við Føroyar.

- Fyribils eru tað tó bara trý ár, ið hava verið óvanliga heit, og tí ber ikki til at staðfesta enn, um talan er



*- Hetta tíðarskeiðið, vit eru í nú, er ikki tað heitasta, vit vita um. Sambært mátingunum í Mykineshólmi vóru árini 1959, 1960 og 1961 eisini óvanliga heit – og umleið líka so heit sum árini 2002, 2003 og 2004. Hetta er ein orsøk til, at vit ikki kunnu siga, um tey trý seinastu árini eru ein avleiðing av alheimsupphitingini, hóast fleiri hitamet eru sett hesi árini, sigur Karin Margretha Larsen*